# Hesi kappast í dans

**Seks solistar, tvær duettir og tveir bólkar fara leygarkvøldið at kappast í finaluni í danska Grand Prixnum. Føroysku The Dreams skulu kappast við bæði kend og minni kend nøvn**

## Grand Prix



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Danir gera nógv burtur úr Tónleika Grand Prixnum – ella MGP, sum teir so snilt rópa tað – og í ár er einki undantak.

Eftir tvær hálvfinalur við samanlagt 16 sangum, er tað nú funnið fram til, hvørji 10 skulu kappast í finaluni, sum veðrur hildin í Horsens leygarkvøldið.

Føroyingar hava kanska serligan áhuga fyri kappingini hesaferð, tí føroysku punkbólkurn The Dreams hevur vunnið sær pláss í finaluni.

Teir skulu kappast við bæði kend og minni kend nøvn í finaluni leygarkvøldið. Millum tey kendu eru skemtari Amin Jensen, sum syngur heiðurssang um Luciano Pavarotti, og Simon Nephew, sum er ein av nýggju poppstjørnunum í Danmark.

Óskrivað bløð sum Sandee May og Kendra Lou bjóða seg eisini fram í kappingini, og tað tykist verða rættilga opið, hvør fer avstað við sigrinum.

### Komu á vegamót

Danska Tónleika Grand Prixið var fyri nøkrum árum síðani komð á eitt vegamót.

## 1

*Hassing & Hassing*

### Come On Over

Hjúnini Anne-Marie og Claus Hassing leggja fyri í finaluni í Grand Prixnum. Tey hava bæði drúgvar royndir sum tónleikarar, og tey hittust fyrstu ferð á Musikkonservatiorinum í Aalborg. Anne-Marie undirvísir í tónleiki og hon hevur eisini verið við til at seta sangleikir upp. Claus er tónleikaframleiðari og virkar sum tóleikari. Tey bæði skriva eisini sangir til aðrar sangarar. Sangurin Come On Over er ein duett millum hjúnini.



**SMS sang 01 til 1212**

## 2

*Simon Mathew*

### All Night Long

Simon Mathew er frá eini rættiligari tónleikafamilju. Hann hevur sungið í gospelkóri, og í 2005 vann hann kappingina Scenen Er Din. Simon er beiggi Rebekku Mathew, sum var onnur av gentunum í Creamy. Simon Mathew hevur eisini vrið við í kappingini Vild Med Dans, og í løtuni arbeiðir hann við einari nýggjari fløguútgávu. Hetta er fyrstu ferð, at Simon Mathew er við til danska Grand Prixið, og hann fer at syngja folkrock-lagið All Night Long.



**SMS sang 02 til 1212**

## 3

*Amin Jensen*

### Luciano

Stóri skemtarin Amin Jensen roynir seg í Grand Prixnum við einum sangi, sum er gjørdur til heiðurs fyri operasangaran Luciano Pavarotti. Amin Jensen hevur samstarvað við Jan Lysdahl um sangin, og hann hevur 25 ára royndir í donskum tónleikalívi. Amin Jensen og Jan Lysdahl hittust fyri 12 árum síðani, og seinnu árini hava teir javna arbeitt saman. Nú royna teir seg so í danska Grand Prixnum við sanginum um Luciano.



**SMS sang 03 til 1212**

## 4

*Kendra Lou*

### Until We're Satisfied

Kendra Lou hevur áður verið at sæð í donskum sjónvarpi, hóast hon ikki er nakað kent navn. Hon var við í kappingini Stjørna í eitt kvøld í 2003, og í fjørheyst var hon við í Hit Med Sangen. Annars heur hon millum annað sungið við í Onkel Danny, o ghon hevur eisini givið fløgur út saman við bólkunum The Society í London og Solar System í Berlin. Sangurin, sum Kendra Lou skal syngja, er skrivaður av Sascha Dupont, Claus Christensen og Jan Winther, og sangurin snýr seg um at stríðast fyri kærleikanum.



**SMS sang 04 til 1212**

## 5

*Unite*

### Tree Of Life

Dreingjabólkurin Unite hevði í fjør eitt stórt hitt í Danmark við sanginum Butterfly, og tað kunnu teir gera sær dælt av í Grand Prixnum hesaferð. Bólkurin Unite hevur verið virkin í sjey ár, og teir fýra sangararnir í bólkinum hava ymsa bakgrund. Ein av teimum hevur ættabond til Uganda og ein annar til Iran. Tað halda teir er ein styrki fyri tónleikin hjá bólkinum. Ætlanin er, at Unite skal geva eina fløgu út í Kina í vár, og Tree Of Life skal verða fyrsta stakfløgan av hesi útgávuni. Men fyrst skal sangurin royna seg í danska Grand Prixnum.



**SMS sang 05 til 1212**

Sosialurin